# »Crash« gjørdist ársins filmur

**Ársins filmar vóru meiri politiskir enn vanligt. Nógvir av teimum sum vunnu vóru ein uppgerð við Bushstjórnina og amerikansk høgravend virði**

OSCAR
*Kim Simonsen*

Filmarnir vóru um rasuórógv og rasismu Crash, um samkynt Brokeback Mountain, politiskur rotinskapur í 50inum Good Night, and Good Luck, hesir eru allir kontroversiellir. Filmurin "Capote" er eisini um samkynta høvundan Truman Capote, ið fór til grundar av at skriva eina bók um morð. Steven Spielbergsa "Munich" er eisini ein politiskur filmur um yvirgang í München í 1972. Hollywood hevur í ár valt at geva virðislønir til álvarsamar og politiskar filmar

Hetta var 78. ferð, at Hollywood gevir Oscarvirðislønina. Tað var sjálvandi spennandi, at síggja, um

Ang Lee (Brokeback Mountain), Poul Haggis (Crash), Steven Spielberg (München) ella Bennett Miller (Capote) fór at vinna fyri ársins film. Crash fór við Oscarinum fyri ársins filmi, hetta var óvænta, men Crash er ein umráðandi og óhugnaligur filmur, ið snýr seg um rasuófrið og nógva kriminaltietin í Los Angeles í dag. Crash var tó "The Dark Horse", tí hann var ein bíligur filmur, ið eingin roknaði við fór at vinna.

Ang Lee vann sum væntað virðisløn fyri leikstjórnanini fyri Brokeback Mountain.

Harður bardagi var um ársins mannliga sjónleikara. Tey flestu hildu, at Philip Seymour Hoffmann (Capote), Joaquin Phoenix (Walk the Line) og Heath Ledger (Brokeback Mountain) allir kundu vinna. Outsidarin her var Terrence Howard (Hustle & Flow). Mong roknaðu við, at hin sera dugnaligi Philip Seymour Hoffmann, ið vit kenna frá bileiklutum í Cold Mountain, 25th Hour, The Talented Mr. Ripley, Magnolia og geniala Happiness hjá Todd Solondz, fór at vinna, og hendan metingin var ikki skeiv. Hin 37 ára gamli leikarin hevur hetta sera væl uppiborið.

### Besti hjáleiklutur

Í ár vóru sera sterkir leikarar útnevndir fyri besta hjáleikutin, her vóru leikarar sum George Clooney fyri politiska filmin Syriana (Hann var eisini instillaður sum leikstjóri fyri politiska filmin Good Night and Good Luck). Matt Dylon sum rasistiskur løgreglumaður í Crash. Paul Giamatti (kendur frá Sideways, American Splendor og Storytelling) fyri leiklutin sum boksipromotarin í Cinderella Man. Kendi William Hurt (Smoke) er eisini nomineraður fyri filmin A History of Violence. At George Cloony vann fyri hin kontroversiella og USA atfinningarsama Syriana, var ikki óvæntað.

Fyri kvinnur í hjáleiklutum, vóru Amy Adams (Junebug), Vatherine Keener (Capote), Frances McDormand (North Country), Rachel Weisz (The Constant Gardender) og Michelle Williams frá Brokeback Mountain. Hesin leikluturin varð fyri atfinning herfyri, har rektarin fyri skúlan hjá Michelle Williams, á Santa Fe Christian School i San Diego, California, einki vildi hava at gera við hana longur, tí hon spælir við í einum filmi um samkyntar menn. Filmurin Brookeback Mountain er er ein provokerandi filmur, serliga í USA, men ikki nakað, ið vit ikki hava sæð í Evropa fyrr. Endin var at Rachel Weisz vann.

### Besti kvinnuligi leikarin

Stóri favoritturnir vóru Felicity Huffman fyri leiklutin í framúrskarandi filminum Transamerica, men eisini Reese Witherspoon frá filminum um Johnny Cash Walk the Line. Annars var Judi Dench nominera fyri filmin "Mrs. Henderson Presents", ið er um eina eldri konu, ið opnar eitt sjónleikarhús undir krígginum. Stóri outsidarnir vóru Charlize Theron (North Country) og Keira Knighley (Pride & Prejudice). Endin var at Reese Witherspoon vann, hetta var ikki uppiborið, meti eg, hon er ein einki serliga dugnaligur sjónleikari og filmurin Walk the Line er alt annað enn góður, Transamerica var betur og Felicity Huffman longdir framman fyri sum sjónleikari.

Tað vóru nógvir spennandi filmar við í ár, sum eisini eru instillaðir til Oscar. Nakrir av hesum eru t.d. A History of Violence (Josh Olson), ið m.a. hevur danan Viggo Mortensen í høvuðsleiklutinum, hesin filmurin er við fyri besta leikrit, men vann einki. Filmurin Memoirs of a Geisha fekk tó tríggjar Oscars, fyri art direction, filming og klæðir. Hetta merkti, at ótrúligi filmurin Charlie and the Chocolate Factory ikki fekk ein Oscars. At Tim Burton onga virðisløn fekk í ár var ein feilur.

### Hvar var King Kongð

Eitt sum var løgi, var at stóri dýri filmurin hjá Peter Jackson King Kong, bert fekk nomineringar fyri t.d. art direction, ljóð og special effects, men onga fyri leikarar, ella leikstjórn.

Øll vóru einaferð í iva, um Jackson megnaði at lyfta uppgávuna at gera teir tríggjar "Ringana Harri" filmarnar, men Jackson kom at skriva filmsøgu við stóru filmatiseringini av Ringana Harra, fyri hetta stóra arbeiði fekk hann, og tey sum arbeiddu saman við honum, 17 Oscarvirðislønir, 12 enskar British Academy of Film and Television virðislønir og 4 Golden Globe Virðislønir. King Kong endaði tó við at fáa 3 Oscars.

### Hví ikki Tim Burtonð

Ein annar genialur filmur frá 2005 var eftir dugnaliga leikstjóran Tim Burton, ið við filminum "Charlie and The Chocolat Factory" gjørt ein av sínum bestu filmum. Johnny Depp var stutt sakt genialur í leiklutinum sum hin eksentriski sjokulátuframleiðarin Willy Wonka, ið mest av øllum minnir um eina stuttligari útgávu av Michael Jackson. Hví nevndin ikki kann taka barnafilmin í álvara, er sera sygiligt. Eg havi ikki sæð Johnny Depp spælt betri síðani Finding Newerland, Blow og Dead Man. Søgan, snýr seg um fátæka arbeiðaradreingin Charlie Bucket, ið livir saman við mammuni og pápanum, báðum ommunum og báðum abbunum í einari lítlari kroysu. Tað kavar inn, tí hol er í loftinum og húsini eru skeiv. Filmurin "Charlie og chokoladefabrikken" er ótrúliga væl gjørdur. Her er ikki bert brúkt special-effekts sum í t.d. "Star Wars", men stórar senur, ið hava kosta nógvar milliónir dollarar. Stóra áin av sjolulátu í filminum er verulig. Her brúktu tey 757.000 litrar, ella 757 tons av sjokolátu. Eisini er ein sena har 100 livandi íkorn spæla við í senn. Slíkar senur eru sera flottar.

Tim Burton fekk bert eina nominering fyri bestu leikbúnar, men eisini fyri Corpse Bride animatiónsfilmin, men her vann Walther & Gromit in the Curse of the Were-Rabbit. Innan animeraðan film, ið er ein risavaksin ídnaður, serliga í Japan, og skjótt eisini í USA og Evropa, eru sera góðir filmar nomineraðir, so sum Corpe Bride (Tim Burton) og Wallece & Gromit in The Curse of the Were-Rabbit (Steve Box og Nick Park), hetta eru ótrúliga góðir filmar, men eisini japanski Hauru no ugoku shiro eftir Hayao Miyazaki er ótrúligur.

Filmar sum The Chronicles of Narnia: The Lion, the Witch and the Wardrobe, Star Wars: Episode III - Revenge of the Sith vóru báðir nomineraðir fyri smyrsl, Star Wars III, eisini fyri ljóð. Ein annar fimur, ið ikki var væl dámdur, var War of the World, hjá Spielberg, men tó var hann instillaður fyri ljóðblanding og special effects. Narnia fekk bert ein Oscar fyri Smirsl, og Star Wars ongan.

### Nógvar feilmetingar

Besti útlenski filmur var afrikanski Tsotsi, ið vann á m.a. týska Sophie Scholl – The Final Days, franska Joyeux Noël.

Tað var gleðiligt, at filmurin Crash vann fyri ársins film, Philip Seymour Hoffman fyri Capote, haldi tó at Matt Dylon kundi vunni fyri Crash, Felicity Huffman fyri Transamerica. At tey valdu March of the Penguins sum ársins dokumentarfilm, var óseriøst, tí í ár var filmurin Darwin´s Nightmare nomineraður, ið allur heimurin tosaði um í 2005. At filmar sum Münich, Cinderella Man, Batman Begins og Charlie and the Chocolat Factory einki vunnu, var ein feilur, og at filmurin Good Night, and Good Luck ikki vann okkurt, var eisini sera skeivt.



*Hóast Joaquin Phoenix taldist millum favorittarnar at vinna virðisløn fyri ársins manliga leiklut, so fór hendan virðislønin til Philip Seymour Hoffmann*

## Her eru allir vinnararnir

**Besti filmur:** "Crash"
**Leikuppseting:** Ang Lee "Brokeback mountain"
Høvuðsleiklutur kvinna: Reese Witherspoon "Walk the line"
**Høvuðsleiklutur maður:** Philip Seymour Hoffman "Capote"
**Hjáleiklutur kvinna:** Rachel Weisz "The constant gardener"
**Hjáleiklutur maður:** George Clooney "Syriana"
**Handrit:** "Crash"
**Handrit eftir bók:** "Brokeback mountain"
**Mynd:** "En geishas memoarer"
**Tónleikur:** "Brokeback mountain"
**Lag:** "It´s hard out here for a pimp"
**Ikki enskt talandi:** "Tsotsi"
**Klipping:** "Crash"
**Teknaður:** "Wallace & Gromit - varulvskaninens förbannelse"
**Dokumentar:** "Pingvinresan"
**Stuttur dokumentar:** "A note of triumph"
**Stuttur teknaður filmur:** "The moon and the son"
**Klæðir:** "En geishas memoarer"
**Smyrsl:** "Narnia - berättelsen om häxan och lejonet"
**Pallmynd:** "En geishas memoarer"
**Ljóð mix:** "King Kong"
**Ljóð redigering:** "King Kong"
**Sereffekttir:** "King Kong"
**Stuttfilmur:** "Sixshooter"